# 5-arin fingið sáttmála

**Andin var góður og mest sum eingin ósemja, tá ið Fimmarin á sjúkrahúsøkinum og Fíggjarmálaráðið gjørdu nýggjan tveyára sáttmála sínámillum**

SÁTTMÁLI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin gjørdi Fíggjarmálaráðið sáttmála við fimm feløg á sjúkrahúsøkinum um nýggjan sáttmála. Feløgini, ofta nevnd 5-arin, eru Bioanalytikarafelagið, Ergoterapeutfelagið, Ljósmøðrafelagið, Fysioterapeutfelagið og Økonomafelagið. Sáttmálin hevur gildið í tvey ár, frá 1. oktober í ár til 1. oktober 2005.

Karmurin fyri avtaluni er umleið 9 prosent. Í semjuni er millum annað avtalað lønarhækking og at flyta stig í lønarstiganum. Bioanalytikarafelagið og Økonomafelag Føroya hava eisini hækkað eftirlønina.

Ymiskar smærri broytingar eru gjørdar í sáttmálatekstinum og veitingum í sáttmálanum. Avtala er gjørd ujm serstaka fríviku. Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004. Eitt prosent er gjørt til tað. Avtala er eisini gjørd um, at starvsfólk kunnu fáa serstøku frívikuna útgoldnað sum løn, vilja tey heldur tað. Avtala er eisini gjørd um førleikamenning.

Sum heild eru partarnir væl nøgdir við avtaluna, og sagt verður, at samráðingarnar gingu fyri seg í einum góðum anda uttan stórvegis ósemjur.



*Tað var kanska ikki so nógva at feira, tá sonevnda tvøroyrarskalið varð undirskrivað, sum skuldi loyva føroyingum at yvirtaka øll málsøki. Í løtuni definera danir, hvar markið hjá føroyingum gongur, og tað kom til sjóndar, tá limaskapur í Norðurlandaráðnum var sýttur*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Danir definera Ríkið

**Danir definera, hvat vit kunnu og ikki. Tað sigur Rúni Joensen, sum ikki dugir at síggja nakra grein í Grundlógini, sum beinleiðis forðar føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Nú vil formaðurin í Uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, hava at vita, um talan er um vánaligt føroyskt lógarverk, ella politiskan ágang frá danskari síðu**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Føroyingar eru ikki myndugir limir í norðurlendsku familjuni. Tað er avleiðingin av, at Norðurlandaráðið ikki vildi ganga føroyska ynskinum um fullgildugan limaskap á møti.

Eitt einmælt løgting samtykti annars tann 18. mars, at Føroyar skuldu søkja um fullgildugan limaskap í Norðurlandaráðnum, men umsóknin fekk kalda móttøku í Norðurlandaráðnum. Orsøkin var, at danski forsætisráðharrin segði hana vera í andsøgn við donsku grundlógina, sum ikki loyvir Føroyum at fáa limaskap í millumtjóða felagsskapum.

Hetta hevur fingið Hergeir Nielsen, formann í Uttanlandsnevndini, at reisa fyrispurning til løgmann í Løgtinginum. Hann vil hava at vita, um løgtingið hevur framt samtykt, sum er brot á donsku grundlógina. Hann spyr løgmann, um okkara umsitingar- og lógarførleiki er nóg neyvur, ella um talan er um rættarligan ágang frá danskari síðu.

Spurningurin er, hví ein samtykt í løgtinginum, sum eftir øllum at døma er brot á grundlógina, kemur ígjøgnum bæði lógardeildina í Tinganesi og umsitingina í Løgtinginum, sum hevur til uppgávu at eftirkanna løgtingsmál.

## Politikkur – ikki jura

Ivasamt er, hvørja grein í Grundlógini Anders Fogh Rasmussen meinar við, tá hann sýtir føroyingum limaskap í Norðurlandaráðnum, tí tað hevur hann ikki viljað sagt enn.

Sosialurin vendi sær til Rúna Joensen, aðalstjóra í løgmálaráðnum, við spurninginum. Hann ger vart við, at løgmálaráðið hevur til uppgávu at eftirkanna uppskot til løgtingslógir, og í hesum føri er talan um uppskot til samtyktar, sum sostatt liggur uttan fyri teirra virkisøkið. Men hinvegin heldur hann problematikkin vera áhugaverdan.

– Eg havi hvørki kannað ella hugsað stórvegis um hendan spurningin, men eg dugi ikki at síggja nakra paragraff í Grundlógini, sum sýtanin fyri, at føroyingar fáa fullgildugan limaskap í Norðurlandaráðnum, kann heingjast á, sigur Rúni Joensen.

Aðalstjórin heldur talan meira vera um eina politiska avgerð enn løgfrøði, og hann sær sama mynstrið aftur í teimum samráðingum, sum í løtuni leika á.

– Hetta hongur kanska saman við øllum tí, sum gongur fyri seg í sambandi við yvirtøkulógina og tær yvirtøkur, sum vit standa fyri at fremja. Danska stjórnin roynir í hesum døgum at definera hugtakið ríkisfelagsskapur og ríkiseind. Tað fyrigongur í forsætismálaráðnum og danska løgmálaráðið hevur bara ein ráðgevandi leiklut. Tað vísir, at hetta snýr seg líka nógv ella meira um politikk enn um løgfrøði, og tað er forsætismálaráðið, sum setir dagsskránna, sigur Rúni Joensen.

## Danir definera

Arbeiðið við yvirtøkulógini er eftir øllum at døma ikki so einfalt, sum tað ljóðaði, tá sonevnda tvøroyrarskjalið varð undirskrivað av løgmanni og forsætisráðharranum. Nú verður viðgjørt, hvat føroyingar kunnu og ikki, og semja er ikki um alt.

– Definerað verður, hvar markið hjá grundlógini gongur. Um vit í Føroyum eru samd ella ósamd hevur eftir øllum at døma minni at siga. Vit kunnu gera vart við, at vit eru ósamd, men tað nyttar einki, sigur Rúni Joensen.

Og sambært aðalstjóranum er júst hetta munurin á at ráða sær sjálvum og ei.

– Eftir ta prosessina, vit hava verið ígjøgnum, er mín varhugi, at tað er hetta, sum suverenitetur snýr seg um: At hava tað síðsta orðið. Teir definera, hvar vit eru í mun til teirra. Vit kunnu mótmæla, men vit hava ikki so nógv at siga, sigur Rúni Joensen.

## Álvarsligt afturstig

Hergeir Nielsen vil hava at vita, hví ongin klokka ringdi, tá uppskotið um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum fór í Løgtingið. Hann minnir samstundis á, at tað er ikki fyrstu ferð, at Løgtingið hevur framt eina einmælta samtykt, sum ikki verður vird, og vísir á hernaðarligur revsilógirnar, sum eru galdandi rættur í Føroyum ímóti Løgtingsins vilja.

– Hesi dømi av fleiri benda á, at talan er um sera álvarsliga afturgongd í ríkisrættarligu viðurskiftum okkara, har sjálv rættartrygdin innan ríkisrættin tykist vera fokin, sigur Hergeir Nielsen.

Hann heldur tað vera skilligt, at føroysk og donsk áhugamál sampakka ikki á fleiri týdningarmiklum økjum, og at føroysk lóggáva rennur seg ímóti ásetingunum í donsku grundlógini, serliga hvat møguleikum okkara fyri víðari samstarvi við hini norðanlondini viðvíkur.

– Orsøk er tá at spyrja, um føroyska lógarverkið er nóg væl at sær komið, ella um danska grundlógin, sum føroyingar ongantíð hava samtykt, veruliga fer at forða okkum í fullgildugum samstarvi við hini norðanlondini, sigur Hergeir Nielsen.



UTTAN ÚR HEIMI

# Al-Qaeda hóttir Tokyo

**Ger japanska stjórnin av at senda hermenn til Irak, fer al-Qaeda at søkja at málum í Tokyo.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, í síðstu viku var í Japan, fekk hann ábendingar um, at Japan er sinnað at senda hermenn til Irak at hjálpa hersetingarvaldinum har.

Nakra beinleiðis tilsøgn fekk hann kortini ikki, og tað hevur uttan iva sína orsøk. Í einum teldubrævi til saudiarabiska blaðið Al-Majallah skrivar Abu Mohammed al-Ablaj, sum verður hildin at vera ein av oddamonnunum í al-Qaeda, at verða japanskir hermenn sendir til Irak, verður Tokyo eitt álopsmál hjá al-Qaeda.

– Japanar fara at kenna sviðan av álopi okkara. Tað, sum vit gjørdu við italiumenninar í Nasiriyah, kann nevnast sum eitt dømi. Vit fara at søkja at sjálvum hjartanum í Tokyo, skrivar al-Ablaj í teldubrævinum sambært AP.

Í 1995 varð Tokyo raktur av yvirgangi, tá dómadagssektin Aum Shinrikyo spreændi nervagass í undirgrundarbreytina í býnum. Tólv fólk doyðu, og fleiri túsund fingu skaða.

Japanski verjumálaráðharrin, Shigeru Ishiba, sigur við AP, at Japan fer at taka lut í arbeiðinum at endurbyggja Irak, men nær landið fer at senda hermenn hagar, er ikki greitt, sigur hann.

# Landgongdin hoyknaði



*Fimtan fólk doyðu, tá ein ein landgongd umborð á ferðamannaskipið "Queen Mary II" hoyknaði leygardagin. Fólk, sum høvdu verið umborð og hugt at tí nýggja skipinum, sum er í dokk, vóru á veg í land, tá landgongdin brádliga fór undan teimum. Sunnudagin vóru Jacques Chirac, forseti og Jean-Pierre Raffarin, forsætisráðharri og hugdu at vanlukkustaðnum.*

# Heldur ikki hesaferð

**Sjálvt um tann víðgongdi Tomislav Nikolic vann greiðan sigur á forsetavalinum í Serbia sunnudagin, hevur landið framvegis ongan forseta.**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri triðju ferð í fjúrtan mánaðir vóru serbar á vali sunnudagin at velja forseta, men eins og tær báðar undanfarnu ferðirnar var vallutttøkan so lítil, at valið er ógildað. Serbisk lóg krevur, at minst 50 prosent av veljarunum greiða atkvøðu, fyri at valið skal hava gildi, men sunnudagin vóru tað bara 38 prosent, sum fóru á val.

Hevði valið verið galdandi, hevði Serbia havt tann víðgongda tjóðskaparmannin Tomislav Nikolic í forsetastólinum í dag. Hann fekk næstan 46 prosent av atkvøðunum, meðan mótstøðumaðurin, tann 73 ára gamli Dragoljub Micunevic, fekk smá 35 prosent.

Nikolic stýðjaði fyrrverandi forsetan Slobodan Milosevic, og hann heldur, at Serbia skal ikki flýggja krígsbrotsmannadómstólinum í Haag fleiri brotsmenn. Hann er eisini ímóti serbiskum limaskapi í ES. Mótstøðumaður hansara er harafturímóti heitur talsmaður fyri ES-limaskapi.

Næsta forsetavalið í Serbia verður í fyrsta lagi í januar.

## Ymisk tøl um sílaaling

ES og Noreg eru ósamd um, hvussu stór sílaalingin í ES-londunum er. Tað kann kanska tykjast løgið, at tveir partar skulu keglast um, hvussu nógv síl verða ald í ES-londunum, men málið hevur kortini stóran týdning.

Upprunin til ósemjuna er, at í september vildi felagið hjá finsku alivinnuni vera við, at norskir sílaalarar høvdu selt fyri undirprís. Teir sendu ES-nevndini kæru um norska prísin. Men skal ein kæra fáa viðgerð, er tað eitt krav, at í minsta lagi 25 prosent av sílaalingini í ES stendur aftan fyri kæruna. Og her kemur ósemjan inn í myndina, tí norðmenn og ES-nevndin eru ósamd um, hvussu stór sílaalingin í ES-londunum veruliga er.

Norsku myndugleikarnir vilja vera við, at minni enn 25 prosent av sílaalingini standa aftan fyri kæruna, og teir krevja tí, at ES skal vísa kæruni aftur. Í Bruxelles hava tey hinvegin roknað seg fram til, at talan er um meiri enn 25 prosent, men ES-nevndin hevur kortini játtað at rokna eina ferð afturat. Fyri norðmenn hevur úrslitið stóran týdning, tí síðani finska kæran kom, hevur ES lagt 21,4 prosent í revsitolli á norsk síl.

## Slakar ikki fyri Bush

Í kvøld kemur amerikanski forsetin, George W. Bush, til Bretlands at vitja,og har skal hann hitta Tony Blair, forsætisráðharra og Elizabeth, drotning.

Undan vitjanini hevur amerikanska trygdartænastan Secret Service kravt, at bretsku myndugleikarnir skulu herða øll trygdartiltøk til tess at tryggja, at einki skal henda forsetanum. Millum annað hevur Secret Service kravt, at skottryggir rútar skulu leggjast uttan á verandi rútarnar í slottinum Buckingham Palace, og at nakrir ávísir veggir á slottinum skulu styrkjast. Men Elizabeth, drotning hevur sagt kortanei, skrivar The Sunday Telegraph. Sambært blaðnum vildi drotningin ikki góðtaka, at amerikanararnir fyltu slottið við trygdarmonnum, meðan forsetin vitjar, men nakrar sleppa teir tó at hava har.

– Hennara hátign heldur, at nú stjórnin hevur gjørt av at lata 5.000 løgreglumenn veita forsetanum trygd, eiga amerikanararnir at hava álit á, at teir duga tað, sum teir eru settir til at gera, sigur ein kelda á Buckingham Palace við The Sunday Telegraph.

## Skal fyri ST

Amerikanska stjórnin hevur gjørt av at taka undir við einum russiskum uppskoti um at lata ST-trygdarráðið taka støðu til friðarætlanina fyri Miðeystur. Talan er um uppskotið, sum ST, ES, USA og Russland hava gjørt, og sum millum annað sigur, at palestinar skulu hava sítt egna ríki í 2005.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur stríðst sum úlvur á skóg ímóti, at uppskotið kemur fyri trygdarráðið, tí so verður friðarætlanin formliga ein ST-ætlan, og tað vil Sharon ikki góðtaka. Higartil hevur amerikanska stjórnin lurtað eftir mótstøðu hansara, men sambært ísraelska blaðnum Ha'aretz hava amerikanarar nú broytt støðu. Umberingin hjá Bush-umsitingini sigst vera, at hon er noydd at taka eina aðra støðu, nú palestinar hava fingið eina nýggja stjórn. USA fanst um vikuskiftið hvassliga at ísraelska búsetingarpolitikkinum í teimum palestinsku økjunum.

Fyrr í hesum mánaðinum var Sharon í Moskva, og har royndi hann at fáa Vladimir Putin, forseta at sleppa uppskotinum um at leggja friðarætlanina fyri ST-trygdarráðið, men til fánýtis.

## Átti eitt barn

Horst Bubeck, sum var fangavørður í Stammheimfongslinum í Týsklandi í sjeytiárunum, skrivar í einari nýgjari bók, at yvirgangsmaðurin Andreas Baader átti eitt barn saman við einum av verjum sínum. Andreas Baader var ein av høvuðsmonnunum í yvirgangsfelagsskapinum Roote Armé Fraktion.

Í bókini skrivar Horst Bubeck, at Andreas Baader og ein kvinna, sum var verji hansara, høvdu javnan kynsliga samveru í klivanum í Stammheim eitt skifti í 1976 og 1977,og at kvinnan átti eitt barn nakrar fáar vikur, eftir at Andreas Baader doyði í oktober í 1977. Sambært bókini var Horst Bubeck ikki tann einasti fangavørðurin, sum visti, hvat hendi inni í klivanum.

Andreas Baader tók lívið av sær í Stammheimfongslinum í Stuttgart í oktober í 1977. Saman við Jan-Carl Raspe, Gudrun Ensslin og Ulriku Meinhof stovnaði hann yvirgangsfelagsskapin Roote Armé Fraktion, sum hevði ábyrgdina av fleiri burturflytingum og morðum í Vesturtýsklandi.